www.oljan.fo

Jan Müller 19 - 06 - 2013

Kina stóran áhuga fyri íslendskari oljuleiting

Hesar seinastu vikurnar er komið fram, at ikki færri enn tvey kinesisk oljufeløg eru í samráðingum við íslendskar myndugleikar og íslendskt oljufelag um møguleikan at vera partur av oljuleitingini í Íslandi. Fyrst CNOOC og nú eisini Sinopec. Leiðirnar norðan fyri Ísland Tað var nú um dagarnar, at tað frættist, at samráðingar eru millum íslendskar myndugleikar og íslendska oljufelagið Eycon øðrumegin og almenna kinesiska oljufelagið CNOOC hinumegin um samstarv í sambandi við oljuleiting í íslendskum sjógvi. Í gjár skrivaði China Daily, at kinesiska oljufelagið Sinopec er farið í samráðingar við íslendsku stórnina um leiting eftir olju og gassi í einum øki í ein norðan og vestan fyri Ísland. Hetta hendir bert stutt eftir, at risastóra almenna oljufelagið China National Offshore Oil Corp. segði frá, at tað var í samráðingum við íslendskar myndugleikar saman við einum íslendskum oljufelag. Í apríl úttalaði íslendski uttanríkisráðharran í amerikanska blaðnum The Wall Street Journal, at Sinopec var í samráðingum við íslendskar myndugleikar um at luttaka í eini kanning í sambandi við oljuleiting í norðaru og eystaru økjunum út fyri Ísland. Økið, sum er kent sum Drekaleiðin, sigst goyma olju og gass og hava íslendskir myndugleikar longu givið loyvi til norsk og bretsk oljufeløg at leita í einum parti av Dreka-økinum. Faroe Petroleum er eitt av hesum feløgum. Kina hyggur norðureftir Tað hevur ljóðað, at kinesiski áhugin fyri samstarvi við Ísland kemst av teirra royndum at fáa fótin fyri seg í tí arktiska økinum, sum Ísland er partur av. Stóri kinesiski orkutørvurin er orsøkin til, at kinesisk orkufeløg eru farin at vísa ikki bert afrikonskum og suðuramerikonskum londum ans men eisini londum kring Norðsjógvin, økinum vestan fyri Hetland, havøkjunum við ísland í Norðuratlantshavi og Arktis. Enn sigur søgan einki um, antin kinesisk oljufeløg hava sett kós móti leiðunum við Føroyar eisini. Tó vita vit, at kinesisk feløg hava keypt upp partar av øðrum oljufeløgum, sum

eitt nú arbeiða tætt upp at føroyska markinum. Dømi um hetta eru Nexen og Talisman. Á oljuráðstevnuni í Havn herfyri segði Johan Dahl, oljumáðharri, at landsstýrið nú meira miðvíst fer at marknaðarføra landgrunnin og oljuleitingina við Føroyar. Møguliga hevur hann eisini kinesisku oljufeløgini í huganum.